# Fólk hugnaðu sær á strondini

Síðstu tveir dagarnar hevur sólin skinið oman og niðan yvir Føroyar, og veðrið kann ikki sigast at hava verið annað enn av tí fagrasta. Flestu fólk í Føroyum hava eisini roynt at fingið mest møguligt burtur úr sóldøgunum.

Í gjár var Grundlógardagur, og tí vóru nógv, sum antin høvdu frí ella fingu tíðliga frí henda dagin. Tað var sjálvandi ymiskt, hvussu hesi valdu at halda Grundlógardagin, men felags fyri ein stóran part av føroyingum var, at tey valdu at halda dagin uttandura.

Í Gøtu høvdu fleiri valt at leggja leiðina oman á Gøtusand. Har vóru fólk, sum gingu túr á sandinum, familjur við smáum børnum og ungdómar, sum hugnaðu sær í sólini.

Fleiri av børnunum og teimum ungu royndu at vera djørv og leypa úti, og kuldin tóktist ikki nerva tey stórvegis.

Eisini í Leynum høvdu fleiri leita sær oman á Leynasand at hugna sær. Eisini her vóru fólk í øllum aldri, og m.a. hevði onkur tikið bólt oman við á sandin, so tey høvdu møguleika at spæla antin fótbólt ella flogbólt. Skipað var harafturat fyri togtogan á Leynasandi í gjár, og hetta dámdi fólki væl.

Líkamikið hvat hesi ymisku gjørdu á sandinum, so var eingin ivi um, at øll hugnaðu sær henda vakra sólskinsdagin á bæði Gøtusandi og á Leynasandi.



*Nógv fólk vóru farin á bæði Gøtusand og Leynasand í góðveðrinum Grundlógardagin. Her síggja vit, hvussu øll hugnaðu sær á Leynasandi í gjár.*

Mynd: Jens Kr. Vang




















